Bleiv skrásettur í skeivari kommunu

Summi siga, at eitt mistak er gjørt. Onnur siga, at alt er ílagi

KOMMUNUVALI‹
Áki Bertholdsen

Sum ta› sæst á grein a›rasta›ni í bla›num, er ta› nú óvist, hvørja lagnu bygdará›i› í Sumbiar Kommunu. Eitt av valevnunum hevur klaga› um manngongdina, sum var› brúkt, tá i› bygdará›svali› var› avgreitt seinasta t‡sdag og hendan kæran skal nú vi›gerast í bygdará›num.

Ta› er Finnbjørn Poulsen, sum hevur klaga› um vali›. Hann hevur bú› uttanlands, men flutti heimaftur á sumri í 1999 og búsettust í Lopra, sum er í Sumbiar Kommunu.

Men á sjálvum valdegnum kom fram, at hann var ikki skrásettur í Sumbiar Kommunu, men í Vágs Kommunu og tí var hann heldur ikki valbarur har. Veljarar fingu at vita, at hann var› strika›ur á listanum.

– Men mitt á valdegnum skrásetir Landsfólkayvirliti› meg í Sumbiar Kommunu og tey, sum komu at velja eftir døgver›a fingu so at vita, at nú kundu tey velja meg , sigur hann. Men hann sigur, at hann var útih‡stur frá valinum í einar f‡ra tímar. Ta› kann hava ávirka› valúrsliti› rættiliga nógv og tí hevur hann kært.

Á Landsfólkayvirlitinum ásanna tey, at tá i› hann flutti heim, var› hann av misgáum skrásettur í Vágs Kommunu, hóast hann bú›i í Lopra.

Men t‡sdagin ver›ur ta› gjørt vart vi›, at hann stendur skrásettur í Vágs Kommunu. Landsfólkayvirliti› flytir hann sí›ani su›ur til Sumbiar Kommunu sama dag. Nú stendur hann, at skrásettur til at hava bú› í Sumbiar Kommunu frá 1.juli 1999, tá i› hann flutti heim.

Á fólkayvirlitinum í Vági siga tey, at har hava tey ongantí› fingi› bo› um, at Finnbjørn Poulsen er skrásettur har í kommununi.

Rannvá Poulsen, sum er forma›ur í valst‡rinum í Sumba, sigur, at Finnbjørn Poulsen var› skrásettur at búgva í Sumbiar Kommunu tann 1. juli 1999.

– Onkusvegna bleiv ta› lopi› út í or›, at hann var› skrásettur í Vágs kommunu og ta› elvdi til órógv. Men so kom eitt faks su›ur sum vísti, at hann var skrásettur í Sumbiar Kommunu. Men í teiginum, har gøtunavni› skuldi standa, stó›, Vágur. Postnummari› er eisini ta› í Vági. Men ni›ri undir stó› Sumbiar Kommuna

Rannvá Poulsen sigur, at ta› er eisini skeivt, at hann var› strika›ur av atkvø›use›linum.

Hon sigur, at ta› sær tó út til, at fólk hava misfata› stø›una og fingi› ta› til naka› anna› enn ta› var.

Sostatt hevur Finnbjørn Poulsen veri› í Sumbiar Kommunu í hálvtanna› ár og tískil hevur hann eisini fullan rætt til at ver›a uppstilla›ur, sigur Rannvá Poulsen.

Rannvá Poulsen sigur annars, at ta› er avmarka›, hvat hon kann siga um máli›, tí ta› er valst‡ri› í Lopra, sum skipar fyri valinum har. Forma›ur í tí er Árni Nielsen, men hann hevur ongar vi›merkingar yvirhøvur.

Noy›ast kanska at velja til bygdará›i› einafer› afturat

Fløkja kom í vali› í Sumbiar Kommunu, tá i› ta› kom út, at eitt av valevnunum ikki var valbært tí ta› var skrásett í Vágs Kommunu. Valevni› hevur nú kært vali›

KOMMUNUVALI›
Áki Bertholdsen

Nú kann ta› enda vi›, at veljarar í Sumbiar Kommunu noy›ast einafer› afturat til veljarabor›i› at velja bygdará›.

Orsøkin er, at bygdará›i› nú hevur fingi› eina kæru um vali› og ta› kann enda vi›, at vali› ver›ur gjørt ógyldugt, og so noy›ast sumbingar í valhølini einafer› afturat

Ta› er eitt av valevnunum, Finnbjørn Poulsen, sum hevur kært um vali›.

Finnbjørn Poulsen var valevni á lista B, sum fekk tveir av teimum fimm bygdará›slimunum.

Fyrst valdur á tí listanum var Jacob Vestergaard, sum er bygdará›sforma›ur hetta valskei›i›, hann fekk 64 atkvø›ur. Næst valdur á lista B var› Niclas Johannes Delmar Hentze, sum fekk 24 atkvø›ur. og ta› blivu teir bá›ir, sum komu í bygdará›i› fyri hendan listan.

Tri›flestar atkvø›ur fekk Finnbjørn Poulsen, sum nú hevur kært um vali›. Hann fekk 13 atkvø›ur og mangla›i sostatt 12 atkvø›ur í at ver›a valdur.

Helt væl til standa

Ta›, sum Finnbjørn Poulsen ikki vil gó›taka, er mátin, sum vali› var› avgreitt uppá.

Men máli› er eitt sindur fløkt og fer helst at krevja drúgva vi›ger› av teimum, sum skulu vi›ger›a kæruna.

Finnbjørn Poulsen hevur bú› uttanlands eitt skifti. Men í fjør summar flutti hann aftur til Føroyar og settust ni›ur í Lopra, sum er í Sumbiar Kommunu.

Har hevur hann so bú› nú í hálvtanna› ár í teirri trúgv, at hann bú›i í Sumbiar Kommunu.

Og nú kommunuval er, ver›ur hann uppstilla›ur á lista B, sum yvirhøvur er manna›ur vi› fólki úr Lopra.

Øll halda væl til standa. Men tá i› vali› skal byrja, ver›ur onkur varugur vi›, at Finnbjørn Poulsen stendur ikki á vallistanum.

– Tá i› máli› ver›ur kanna› nærri, vísir ta› seg, at eg eri ikki eru skrásettur í Sumbiar Kommunu, men í Vágs Kommunu, sigur hann.

– Hetta skapti eitt sindur av rumbli á valsta›num og ta› endar vi›, at fólk fáa at vita, at tey kunnu ikki velja meg. Eg var ikki í kommununi og tí var eg eisini strika›ur av listanum. Tey fingu at vita, at valdu tey meg, bleiv atkvø›use›ilin gjørdur ógyldugur.

Hann sigur, at hann veit um fleiri veljarar, sum tóku hetta til eftirtektar og sum tíansheldur valdi onkran annan.

– Men sí›ani hendir ta›, at fyrispurningur ver›ur sendur nor›ur til Landsfólkayvirliti›. Og á Landsfólkayvirlitinum ver›ur hann sí›ani skrásettur umaftur so at hann nú hoyrir heima í Sumbiar Kommunu.

– Eg ringdi til Landsfólkayvirliti› um morgunin og fekk at vita, at eg var› skrásettur í Vági.Tá i› eg ringdi aftur aftaná døgver›a, fekk eg at vita, at nú var eg skrásettur í Sumba. Tvs, at hesa tí›ina hevur onkur ringt nor›ur á landsfólkayvirliti› og fingi› meg sluttan su›ur.

– Veljarar, sum so komu á val aftaná døgver›a fáa so at vita, at nú kunnu tey velja meg, sigur Finnbjørn Poulsen

Hann leggur afturat, at hann fyrst fekk at vita frá valst‡rininum, at atkvø›use›ilin var ógyldugur, vi› til hansara blivu kendar ógyldugar. Sí›ani fekk hann at vita, at hansara egna atkvø›a fór at ver›a kend ógyldug, tí hann stó› ikki á vallista, men at tær atkvø›ur, sum eg annars fekk, blivu gó›kendar.

Hann heldur ikki, at hendan framfer›in kann vera røtt og tí hevur hann gjørt av at kæra um mannagongdina, sum var› brúkt, tá i› vali› var› avgreitt.

– Ta› kann ikki bera til, at eg skal vera útih‡stur frá allari fyrru helvt av valinum, sigur hann.Hann sigur, at skuldi atkvø›use›ilin blivi› ógyldugur tí at fólk høvdu atkvøtt fyri honum, eigur alt vali› at ver›a gjørt ógyldugt.

Fáa 10 dagar

Hilmar Høgenni sigur, at klagur um bygdará›svali› skulu ver›a skrivligar og skulu stílast til bygdará›i› í seinasta lagi átta dagar eftir, at vali› er endaliga gjørt upp, tvs. aftaná fíneljingina. Og fínteljingin skal í seinast lagi vera dagin eftir vali›.

Tá i› teir átta dagarnir eru farnir, fær bygdará›i› sí›ani 10 dagar at vi›ger›a kæruna í. Á›renn bygdará›i› tekur avger›, skal hon bi›a valst‡ri› um ummæli. Avger›in hjá bygdará›num kann sí›ani kærast til landsst‡ri›.

Hann sigur, at ta› er valst‡ri›, sum hevur ábyrgdina av at kanna, at atkvø›use›ilin er ílagi. Hann sigur eisini, at ta› er ikki loyvt at broyta atkvø›use›ilin. Er feilur í honum, skal hann sostatt prentast umaftur.

Áv tí at landsst‡ri› er kærumyndugleiki, vil Hilmar Høgenni ikki siga, hvat hann heldur um hetta máli

Veljararsum fóru ával í Lopra fyri døgver›a, fingu tey at vita, at tey kundu ikki velja Finnbjørn Poulsen, tí hann var ikki skrásettur at búgva í Sumbiar Kommunu og kundi tí heldur ikki stilla upp. Seinni um dagin var› mistaki› tó rætta›, so at veljarar sum komu á val aftaná døgver›a fingu onki at vita um hetta

N‡ggj lei›sla í Klaksvík

Vi› Tjó›veldisflokkinum á odda er n‡ggj samgonga skipa› í b‡rá›num í Klaksvík. Fólkaflokkurin fer nú í andstø›u

KLAKSVÍK
Ey›un Klakstein og John Johannessen

Samrá›ingarnar millum Tjó›veldisflokkin, Javna›arflokkin og Sjálvst‡risflokkin um eina b‡rá›ssamgongu í Klaksvík eru nú komnar so langt, at flokkarnir eru vor›nir samdir um samstarv. Nú er eftir at gera eitt samgonguskjal.

Fríggjakvøldi› samráddust flokkarnir frá klokkan 20.00 til klokkan 23.00, og tá komu teir á mál.

Flokkarnir eru vor›nir samdir um, hvør skal vera borgarstjóri, og hvør skal manna tær ymsu nevndirnar.

Ta› ver›ur Steinbjørn Jacobsen úr Tjó›veldisflokkinum, sum ver›ur borgarstjóri. Varaborgarstjóri ver›ur Torleif Sigur›sson úr Javna›arflokkinum.

Verandi og komandi borgarstjórar í Klaksvík. Jógvan vi› Keldu og Steinbjørn Jacobsen práta saman valkvøldi›.

Mynd: TS

Strí› um borgarstjóran

Sí›ani valkvøldi› fyri viku sí›ani hevur veri› tosa› aftur og fram um samgongu, men stóra strí›smál hevur veri› borgarstjórasessurin, sum tríggir flokkar hava hildi› seg havt rætt til.

Tjó›veldisflokkurin bo›a›i valkvøldi› frá, at hann vildi hava lei›sluna, tí hann hev›i størstu framgongdina á valinum.

Fólkaflokkurin, sum hevur havt borgarstjóran seinastu átta árini, vildi ikki geva lei›sluna frá sær, tí flokkurin er framvegis størsti flokkur í Klaksvík.

Og til seinast helt Javna›arflokkurin eisini, at hann átti rætt til borgarstjóran, tí flokkurin stó› saman vi› Sjálvst‡risflokkinum í samrá›ingunum.

Nevndirnar broyttar

Flokkarnir ætla at skipa nevndirnar ø›rvísi, enn tær hava veri› skipa›ar seinasta valskei›. Nú ver›a fleiri nevndir, enn ta› hava veri›.

Sambært okkara uppl‡singum skal Ey›gunn Samuelsen úr Javna›arflokkinum ver›a forma›ur í Sosialu nevnd, og n‡valda Jórun Høgnesen úr Tjó›veldisflokkinum ver›a forma›ur í Mentanarnevndini. Seinastu f‡ra árini hevur hetta veri› ein og sama nevnd. Men n‡ggja b‡rá›i› heldur, at arbei›i› innan hesi øki eru so t‡dningarmiki›, at ney›ugt er at hava eina nevnd til hvørt øki›.

Rani Nolsøe úr Tjó›veldisflokkinum ver›ur forma›ur í n‡ggjari nevnd, sum kallast Umhvørvis- og menningarnevndin. Hetta er ein vi›kan av núverandi Heilsunevndini.

Torleif Sigur›sson úr Javna›arflokkinum ver›ur forma›ur í Havnanevndini, og Karl Heri Joensen úr Sjálvst‡risflokkinum ver›ur forma›ur í Teknisku nevnd og Byggi- og b‡arskipanarnevndini.

Steinbjørn Jacobsen er sum borgarstjóri forma›ur í Fíggjarnevndini.

Báturin sakk fyri nøsini á hjálparleysum sløkkili›i:

Brandpumpurnar rigga›u ikki

Útró›rarbáturin Svartbakur sakk vi› bryggjuna í Nor›depli, tí Klaksvíkar Sløkkili› møtti vi› pumpum, sum vóru í ólagi. Sløkkili›slei›arin vi›urkennir, at talan er um álvarsliga hending

ÓHAPP
Ey›un Klakstein og John Johannessen

Ta› nytta›i líti› hjá Klaksvíkar Sløkkili›, at rópa allar menn til pumpurnar, tá hol kom á útró›rarbátin Svartbak fríggjakvøldi›.

Svartbakur var á veg til útró›rar, tá báturin rendi á land vi› Sundaberg. Hol kom á bógvin, og teir bá›ir menninir, sum vóru umbor›, settu kós aftur á Hvannasund, ha›ani teir vóru komnir.

Teir klára›u at halda lens, me›an teir sigldu, men holi› í bátinum var so miki› stórt, at vandi var fyri, at hann skuldi fara til botns. Tí var› sløkkili›i› í Klaksvík bo›sent at koma á sta›i› vi› pumpum.

Rigga›u ikki

Bilar hjá Klaksvíkar Sløkkili›i fóru úr Klaksvík vi› blinkandi ljósum og ‡landi sirenum og stó›u klárir at taka ímóti bátinum, tá hann kom til bryggju í Nor›depli.

Men tá var ta›, at trupulleikin gjørdi vart vi› seg.

Tá tær tríggjar pumpurnar skuldu setast í gongd, rigga›u tær ikki. Ein pumpa fekst í gongd, men hon fekst heldur ikki rættiliga at rigga.

Ta› eydna›ist at sleipa Svartbak, sum lá tungur í sjónum, yvir í fjørina og harvi› for›a fyri, at hann rættiliga fór undir.

Motorur og elektrisk útger› hava tó veri› undir í sjógvi, og sjógvur hevur eisini veri› í lugarinum. Líkt er til, at nautiska útger›in er sloppin.

Men ska›in er størri, enn hann hev›i veri›, um pumpurnar hjá sløkkili›num í Klaksvík rigga›u, tá báturin kom til lands.

Hetta er álvarsamt

Kári Kjelnes, lei›ari fyri Klaksvíkar Sløkkili›i, váttar, at trupulleikar vóru vi› pumpunum, sum sløkkili›i› hev›i vi› sær til Nor›depils fríggjakvøldi›.

– Sløkkili›i› hev›i tríggjar smáar pumpur vi› sær, sum vit vanliga n‡ta umbor› á smáum bátum. Men tvær av pumpunum fingust ikki í gongd, sigur Kári Kjelnes.

Lei›arin fyri sløkkili›i› í Klaksvík ásannar, at ta› ta› er álvarsamt, at útger›in hjá sløkkili›num ikki virkar. Men hann vísir samstundis á, at sløkkili›i› hevur bílagt n‡ggjar pumpur. N‡ggju pumpurnar ver›a sløkkili›num í hendi tí›liga í januar.

Orsøkina til, at pumpurnar ikki virka›u sigur Kári Kjelnes vera einfalda. Tær eru gamlar og útslitnar.

Fer ikki at endurtaka seg

Hann heldur tó, at hetta merkir kortini ikki, at sløkkili›i› ikki hev›i veri› ført fyri at hildi› til dømis Dúgvuni lens, um hon fór at leka í Klaksvík.

– Vit hava tríggjar stórar pumpur, sum vit kunnu seta umbor› á skip, og haraftur at hava vit eina stóra pumpu á Mercedes bilinum hjá okkum, so ta› hev›i ikki veri› nakar trupulleiki hjá okkum at pumpa sjógv úr einum størri skipi, sigur Kári Kjelnes.

Stóru pumpurnar eru kortini ikki serliga væl egna›ar til at pumpa sjógv úr smáum bátum. Tær eru tungar og taka nógv pláss. Men skuldi eitt líknandi óhapp hent aftur, á›renn sløkkili›i› fær n‡ggju pumpurnar, ber altí› til at leggja slangu frá stóru pumpuni á Mercedes brandbilinum.

Keddur um óhappi›

Ta› er Torleif Sigur›sson í Klaksvík, sum eigur Svartbak. Hann hevur ikki hug at gera vi›merkingar til hendingina, men hann er keddur um óhappi›.

– Báturin er tikin upp á bedingini í Klaksvík, og har kemur hann at standa, til ney›ugu umvælingarnar eru gjørdar, sigur Torleif Sigur›sson, sum fekk bo›ini um óhappi›, júst sum samrá›ingarnar um n‡ggja b‡rá›ssamgongu í Klaksvík komu á mál fríggjakvøldi›.

Tjaldri› sleipa›i leygarmorgunin Svartbak til Klaksvíkar, har hann nú stendur á beding.